# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## 30 ára starvsdagur



Tann 15. juni hevði Kristina Hansen 30 ára starvsdag sum reingerðarfólk hjá Advokatskrivstovuni, Fr. Petersensgøta 9.
Kristina byrjaði sum reingerðarfólk í 1977, tá ið skrivstovan helt til í Niels Winthersgøtu 7. Seinni flutti skrivstovan út í Fr. Petersensgøtu, og hevur Kristina alla hesa tíð samvitskufult og trúfast arbeitt og røkt sínar skyldur í samfull 30 ár.

Kristina er fødd og uppvaksin á Strondum. Hon giftist við Hans Christian Hansen av Toftum, og búsettust tey í J. Paturssonargøtu í Havn.

Vit takka Kristinu fyri góða og trúgva tænastu.

**Starvsfólkini**

## Deildarstjóri leggur frá sær



Jóannes Dalsgaard, sum hevur verið deildarstjóri í Mentamálaráðnum seinastu skjótt 10 árini, fer nú frá vegna aldur. Í hesum sambandi verður søkt eftir nýggjum deildarstjóra.

Jóannes Dalsgaard hevur farnu 10 árini starvast sum deildarstjóri í Mentamálaráðnum, har hann hevur havt ábyrgd av hægri útbúgvingum, gransking og mentan. Jóannes, sum er cand. mag. í søgu og fronskum og doktari í søgu, tók við starvinum sum deildarstjóri 1. januar 1998, tá ið Mentamáladeildin í Tinganesi og Landsskúlafyrisitingin formliga vórðu lagdar saman til táverandi Undirvísingar- og Mentamálastýrið, ið seinni skifti navn til Mentamálaráðið.

Jóannes hevur verið sera virkin á sínum ábyrgdarøki, har nógvar broytingar eru framdar í hansara tíð. Eitt nú kann nevnast lóggávan um Mentanargrunn Landsins, Tjóðpall Føroya og lógin um stuðul til mentan og list, samanlegging av SvF og UF í Kringvarp Føroya, sum eisini fekk eina nýggja og nýtímans kringvarpslóg o.m.a. Harumframt hevur Jóannes verið sera virkin í tí norðurlendska samstarvinum, har hann hevur umboðað Føroyar í fleiri norðurlendskum serfrøðinganevndum, eitt nú í vísmannabólki norðurlendska ráðharraráðsins, norðurlendska mentanargrunninum og í embætismannanevndini fyri norðurlendskt mentanarsamstarv. Jóannes hevur eisini umboðað Føroyar í samráðingum við onnur lond, og leiddi hann eitt nú tær samráðingar við svenskar myndugleikar, sum endaðu við, at Kongsbókin við Seyðabrævinum varð latin Føroyum aftur. Jóannes hevur eisini, samstundis sum hann hevur verið deildarstjóri, í avmarkaðum tíðarskeiðum røkt størvini sum ávikavist settur landsskjalavørður og settur landsantikvarur.

Undan starvinum í Mentamálaráðnum var Jóannes landsskjalavørður, rektari, deildarstjóri og lærari. Jóannes hevur verið í almennari tænastu í skjótt 40 ár. Tað er ein trúgvur og dugnaligur embætismaður, ið nú leggur frá sær.

Jóannes Dalsgaard fer úr starvi tann 31. august, og Mentamálaráðið fer nú at lýsa starvið hjá Jóannesi leyst.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Borgný Steinvør Petersen**, fødd Johannesen, ættað av Sandi, búsitandi í Skanderborg andaðist 22. juni á Silkeborg Sjúkrahúsi, 61 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Skanderup kirke týsdagin 26. juni kl. 11.

**Magnus Egholm**, ættaður úr Hvalvík, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 23. juni 82 ára gamal. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni týsdagin 26. juni kl. 18. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Leivur Høgnesen av Argjum** andaðist fríggjadagin 22. juni á Pleygudeildini í Havn, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju í dag kl.14.00.

**Hans Jacobsen**, vanliga nevndur Hans hjá Simonu, ættaður úr Hvalba, andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi leygardagin 23. juni, 87 ára gamal. Farið verður úr kapellinum mikukvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju hósdagin kl. 13.

**Jógvan Petersen**, Tórshavn, fer til gravar úr Havnar kirkju mikudagin klokkan 13. Bønarhald verður í Havnar kirkju týsdagin klokkan 18.

**Jutta Hansen, Fuglafirði**, ættað úr Klaksvík, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi leygardagin, 84 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Klaksvíkar sjúrkshúsi týsdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 14 úr Fuglafjarðar kirkju.

**Anna Simonsen, Tórshavn**, andaðist á Lágargarði, leygardagin, 23. juni, 77 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Hans Mortensen**
Sørvági

andaðist á Landssjúkrahúsinum 22. juni,
79 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Kedron mikudagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Herluf, Robert, Marner, Petur Arni og Jonna**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

### Prógv

Hósdagin 21. juni fekk Jutta S. Linklett, Fuglafjørður, prógv sum Damuskraddari frá Alexandra-Skolen í Frederikshavn.

### Dagurin

**26. juni. Pelagius,** deyður umleið ár 925. Ein 10 ár gamal drongur, sum varð tikin av døgum, tá ið maurar ráddu í Spania.